3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

DAGFINN OLSEN

Malan Thomsen



Malan Thomsen

Fyri lítlari viku sí›ani kom á markna›in føroysk fløga. Ta› hendir meira enn so, men ta› sermerkta vi› fløguni er líkasum b‡tt í tveir partar. Ta› fyrra er, at ta› er ein av landsins royndastu sangarum, tá ta› sn‡r seg um útgávu, sum her gevur út á fyrsta sinni. Sí›ani er ta› eisini so, at fólkini aftanfyri fløguna, framlei›ar-ar og tónleikarar, eru millum tey fremstu á okkara lei›um. Øll á einum sta›, somu útgávu.

Og so kann úrsliti› ikki gerast vánaligt, kemur gløggi lesarin fram til, og hann fer ikki heilt skeivur, tí úrsliti› er flott.

Talan er um Popp vi› stóra P. Ella stóra F, tí talan er eisini um føroyskan popp og hetta hevur sangfuglurin sjálvur sta›fest. Sambært Malan Thomsen, so var ta› júst ætlanin og ta› er eisini úrsliti›. Verri er ikki, at so frægir popparar, sum Kári Jacobsen og Kim Hansen hava skriva› løg til Maluna. Niclas Johanesen hevur eisini skriva› og hann hevur gjørt seg galdandi innan popp, umframt rock, á›ur.

Ta› eru Finnur Hansen og Malan, i› standa aftanfyri útgávuna. Umframt at spæla, syngja og framlei›a, hava tey eisini sett or› og løg saman.

Stílurin avslappa›ur. Og hetta hóskar, tí ta› er einki yvirspent yvir sangaranum- Maluni Thomsen.

Røddin er í javnvág allan vegin, júst sum vit kenna hana. Og vi› hesi fløguni eru fleiri prikkar yvir i'inum: fløgan er innspæld vi› Finni handan knøttarnar, tangentarnar og n‡ggjastu tøknina, - frægastu tónleikarar spæla og syngja og leggja botn í. Ein botn, sum ikki kann gerast anna›, enn gró›rarbotnur fyri kreativar sálir, - og altjó›a føroyingurin nummar eitt, Óli Poulsen, hevur ljó›blanda›. Og lat okkum so ikki gloyma Maluna, sum eisini hevur sty›ja› so mangar a›rar útgávur vi› síni rødd og ríka› føroyska plátusavni›.

Kritiskar røddir hava nevnt, at talan er ikki um stór útsving og at "alt er ov beint fram". Hetta er tó meira ein spurningur um hvat ein einum dámar og hvønn veg ein hellur tónleikaliga. Hetta er ein vøkur poppfløga, i› øll kunnnu seta á og lurta eftir. Bæ›i frísk og troytt oyru. Eingin ivi um ta›.

Í alt ein fløga, i› er gó› og sum sanniliga eisini hevur veri› nógv at hoyra hesa fyrstu vikuna, i› hon hevur veri› tøk. Og ivaleyst eru løg, i› vit koma at hoyra aftur og aftur. T.d. Stjørnurnar Blinka, Minnist Enn, Ta› ver›ur Gott og Dagur kemur Dagur fer.

Gorge Strait

Gratest Straitest Hits

Ein country fløga av fyrstu skuffu. Og ta› merkir gó›, um einum dámar contry.

Nú er ta› so, at ta› eru ofta bert tveir vegir. Og í hesum førinum ikki tann brei›i og smali. Men heldur er ta› so, at antin dámar einum country ella dámar einum ikki country.

Hjá teimum, i› ikki fegnast um rættan country tónleik, skal henda fløgan ikki í savni›. Men hjá country fjepparum, stendur slík fløga óiva› frammaliga á hillini, so hon er tøk, tá á stendur.

Talan er um 15 hitt. Og sum heiti› sigur so beinraki›, so er talan um strait hits. Hetta er fyri ta› mesta tónleikur, i› er strait. Ella beint fram eftir landavegnum Ikki krevjandi, men sera lívsjáttandi, svingandi og so er søgan eisini ofta gó›.

Og umframt rútmu og gó›an tónleik, so hevur søgan nógv at siga í country sangum. Um søgan so er syrgilig ella hevur happy end. Skemtisøgan sigur jú, at um ein spælir ein countrysang aftanífrá (frá enda til byrjan), so fær ein hús, konu, børn, bát og bil aftur.

Henda fløgan kann l‡sast vi› or›inum Strait.

Vengaboys



The Platinum Album

Vengaboys. Gla›ir tónar. Eggjand og lívsgla›ar rútmur. Vengaboys: eitt av heitu nøvnunum, nú fari› er um aldaskifti›.

Og eins og vanligt vi› Vengaboys, so er fyrsti minutturin nóg miki› til at sta›festa lívsgla›a stílin. Og bert at lesa heitini á løgunum sta›festir, at Vengaboys er Vengaboys: Shalala Lala, Uncle John From Jamaica, Skinnydippin', Cheekah Bow Bow (That Computer Song).

Hetta er ein stílur, i› tykist koma undan kavi hvørt 5. ár, ella so. Vit hava á›ur sæ› m.o. Boney M, og hinar sviarnar, i› sungu Huba Huba Zut zut, ella hvussu ta› stava›ist.

Gla›ir tónar og or›, i› kunnu syngjast í Fugloy ella á Fiji. Meiningin er hin sama, nevniliga eingin, sjalala!!

So herligt og óforpliktandi, at ein syngur ta› á morgni framman fyri spegilinum, á›renn ein veit av og so er ta› ein gó›ur morgun.

Á fløguni eru 14 løg, i› eru løtt at svølgja.

Lætt og gott.

NOKIA
CONNECTING PEOPLE
Fartelefonir

Prísir frá kr. 1.595,-

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Tlf.: 317620 - Fax: 317699 - Heimasíða: www.tt.fo

1 stk. renoveraður XG12 el-drivin stáplari til sølu



Lyftiorka: 1.200 kg.
Lyftihædd: 2.895 mm. við frílyft

Sosialurin - 311820

Sp/f Norð Trukk
Postrúm 1315 • 110 Tórshavn • Tel. 315136 • Fax 310931

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:

Skrásetingar-nr. Sp/f 267, **Sp/f Grannsko›arafelagi› Rasmussen & Weihe, 100 Tórshavn.**

Vi›tøkur broyttar: 26.02.20000
N‡tt navn: P/F Rasmussen & Weihe
Kapitalur:
Hækking vi› kr. 1.800.000,00 til kr. 2.000.000,00. Flokkar: A kr. 520.000,00 og B kr. 1.480.000,00.
Inngjaldingarháttur: Kr. 1.800.000,00 vi› grunshækking. Flokkar: A. kr. 468.000,00 og B kr. 1.332.000,00.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Ann Mary á Rógvi Rasmussen, Undir Gla›sheyggi 6, 100 Tórshavn (forma›ur), Ole Johan Guldborg Nielsen, Turi›argøta 16, 100 Tórshavn og Klaus Rasmussen, Undir Gla›sheyggi 6, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella av nevndarformanninum.

Skráseting Føroya tann 24. mars 2000

Kristin Balle

TELDU-KOYRIKORT

Nýggj skeiðtænasta frá Farodane

Teldukoyrikortið er evropeiskt prógv, sum er grundað á góðkendan KT-førleika. Ein førleika, sum prógvar at luttakarin hevur staðið sjey royndir í nýtslu av teldu og mest vanligu forritunum.
Teldukoyrikortið er grundað á royndir innan tey sjey fakøkini, sum eru mest umráðandi sambært KT-krøvunum í upplýsingarsamfelagnum í dag. Royndirnar kunna takast á royndardepli, sum er góðkendur av Dansk Dataforening. *Skeiðstovan Kvasir er góðkendur royndardepil.*

TELDUKOYRIKORT

SKEIÐHEITI: MI-SP
Mikudagar seinnapart, kl. 13.00-16.15

SKEIÐHEITI: TÝ&FR-FP
Týs- og fríggjadagar fyrrapart, kl. 09.00-12.15

SKEIÐHEITI: TÝ&HÓ-KV
Týs- og hóskvøld, kl. 16.00-19.30

Fyrsta skeiðið byrjar 4. apríl

TILMELDING frá heimasíðu okkara: kvasir.farodane.fo
- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail: kvasir@farodane.fo

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
SKOTARÓK 14
100 TÓRSHAVN
TLF. 211861 og 311414
FAX 317534

fd-3a-00

Hjálparfólk

Eitt starv sum hjálparfólk er leyst at seta á Føroya Landsbókasavni 1. mai ella skjótast gjørligt. Fólk við royndum í bókasavnsarbeiði hava fyrimun.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn verður at senda Føroya Landsbókasavni í seinasta lagi 17. apríl 2000.

FLB
Føroya Landsbókasavn
J. C. Svabosgøta 16
Box 61
FO-110 Tórshavn

fk

SpF Teldu Tænastan
www.tt.fo

BILSMIÐUR

Vit sóknast eftir einum dugnaligum bilsmiði til persónbilaverkstað okkara at byrja skjótast.

Ætlanin er, at tann, ið settur verður í starvið, skal verða næsti maður verkførarans. Hetta viðførir eftirútbúgving til kunnleikastøði av Volvo og Renault persónbilum.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum.

Um tú hevur fyrispurningar um arbeiðið, kanst tú ringja og spyrja eftir Johannes Rasmussen, verkførara.

Sosialurin - 311820

pf. Brøður Petersen Bilar
Hoyvíksvegur 61 • Boks 3130 • FO-110 Tórshavn • Tel. 31 43 60 • Fax 31 56 96

Brøður Petersen Bilar umboðar Volvo þersónbilar, lastbilar og bussar og Renault þersónbilar. Umframt þersónbilaverkstað hava vit eykalutagoymslu, søludeild og lastbila- og bussverkstað.

60 tonsari til sølu

Vælhildin útróðrarbátur til sølu. Báturin er útgjørdur við egningarmaskinu og annars allari vanligari útgerð. Loyvi á innaru leiðum (4B) og á Føroya Banka.

Nærri fæst at vita við at venda sær til

ANLANTIC BROKERS
Tel. 312238 • Fax 310907

HITT KONSERT OG DANSUR

Fríggjakvøldið 31. mars
í Badmintonhøllini í Tórshavn

Leygarkvøldið 1. apríl
í Ítróttarhøllini í Runavík

Tey kendu hittini hjá Moirae, Terja og Føstufressum, Frændum, Eyðun Nolsøe Band og Eyðun & Terja verða spæld.

Kl. 23.00-03.45 • Kr. 100,-

Sosialurin - 311820

FLOGFRAKT/
SJÓFRAKT

SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING
& ØLL PAPPÍR

Tlf. 31 22 22

DIESEL BILAR til sølu

Ford Escort 1,8 DIESEL
BMW 318 TDS DIESEL

Lagalig fígging.

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 ella 21 73 00

FIAT

Sosialurin - 311820